gult cyan magenta svart

Fíggjarnevndin má meta um máli› hevur skund

St‡risskipanarlógi n sigur púra greitt, at eykajáttan ver›ur veitt vi› løgtingslóg. Fíggjarnevndin kann í serligum føri víkja frá hesum, um mál hava serligan skund - men ta› hev›i hetta máli› ikki, sigur virkandi fíggjarnevndarforma›urin, Vilhelm Johannesen

EIRIKUR LINDENSKOV

– Ta› má vera upp til fíggjarnevndina at meta um, hvørt eitt mál hevur skudn ella ikki.

Hetta sigur Vilhelm Johannesen, sum er forma›ur í fíggjarnevnd løgtingsins, me›an Bjarni Djurholm er burturstaddur.

Vilhelm Johannesen er als ikki samdur vi› Heina O. Heinesen, sum í Sosialinum leygardagin fanst at minnilutanum í fíggjarnevndini, sum fríggjadagin vísti umbønini frá løgmanni um eykajáttan til løn til n‡ggja landsst‡rismannin frá sær.

Virkandi fíggjarnevndarforma›urin undrast eisini á úttalilsi› hjá Bjørn á Heygum, advokati, sum í Degi og Viku fríggjakvøldi› leg›i andstø›uumbo›ini í fíggjarnevndini undir at spæla hund vi› á henda hátt at for›a løgmanni at seta n‡ggja landsst‡rismannin.

– Ta› stendur púra greitt í grein 44 stk 1 í st‡risskipanarlógini, at eykajáttan ver›ur veitt vi› løgtingslóg. Tá er ein undantaksregla galdandi, at um mál hava skund, so hevur fíggjarnevndin heimild at veita frávik, og sum í hesum føri at játta pengar uttan um løgtingi›, sigur Vilhelm Johannesen.

– Men máli› hevur ikki skund, sigur Vilhelm Johannesen. Hann vísir á, at Signar á Brúnni fór frá tann 28 mars. Í apríl kemur landsst‡ri› í tingi› vi› einum eykajáttanaruppskoti. Har ver›ur einki nevnt um pengar til n‡ggjan landsst‡rismann. Í mai ver›ur løgtingi› kalla› saman til at vi›gera eitt eykajáttanaruppskot frá landsst‡rinum. Har ver›ur heldur einki nevnt um pengar til n‡ggjan landsst‡rismann. Í juni hendi einki.

Ikki fyrr enn 11. juli kemur umbønin frá løgmanni.

– Ta› kann ikki bera til, at máli› nú brádliga hevur fingi› skund, sigur Vilhelm Johannesen.

Ta› sum Vilhelm Johannesen heldur vera serliga løgi› er, at ta› júst var tingmanningin hjá Tjó›veldisflokkinum, sum stríddist vi› hond og fót fyri at fáa tingformannin at seta ein kanningarstjóra at kanna arbei›sháttin hjá Signari á Brúnni. Endamáli› var, at um hann var› reinsa›ur, so skuldi hann setast aftur sum landsst‡risma›ur.

– Nú fáa vit at vita, at kanningin ver›ur li›ug um ólasøkumundi›. Hví kann løgma›ur so ikki bí›a eftir kanningarúrslitinum, spyr Vilhelm Johannesen.

– At Tjó›veldisflokkurin hevur ein innanh‡sistrupulleika – og at tey júst hava havt eina innanfloksuppger› um Signar á Brúnni er ikki nóg miki› til at fáa fíggjarnevndina at broyta si›venju, heldur Vilhelm Johannesen.

Eg vil ikki vera tann fyrsti at broyta si›venjuna

Vil landsst‡ri› hava pengar til løn til Tórbjørn Jacobsen beinanvegin, so kunnu teir kalla tingi› saman, solei›is sum fyriskriva› er í st‡risskipanarlógini, sigur fíggjarnevndarforma›urin, Bjarni Djurholm

EIRIKUR LINDENSKOV

Eisini forma›urin í fíggjarnevndini, Bjarni Djurholm, sum er burturstaddur í sjúkuørindum, undrast á skuldsetingarnar hjá Heina O. Heinesen í bla›num leygardagin.

– Heini O. Heinesen kennir væl si›venjuni hjá fíggjarnevndini ikki at ganga slíkum umbønum á møti. Fyri ta› næsta, so var ta› Tjó›veldisflokkurin sum stríddist sum úlvur á skóg fyri at fáa kanningarstjóra settan at kanna Signar á Brúnni. Endamáli› var, at um hann var› reinsa›ur, so skuldi hann setast aftur sum landsst‡risma›ur. Tí skilji eg púrt einki av hesum, sigur Bjarni Djurholm.

Fíggjarnevndarforma›urin vísir eisini aftur, at hann skal hava veri› so í›in at leggja Signari á Brúnni fótonglar í vegin, tá umbønin um pengar til sjónvarpi› var› avvíst í fjør.

– Hatta er ta› reina vrøvl. Hatta ber als ikki til, tí hatta máli› var› ongantí› vi›gjørt í fíggjarnevndini. Hatta kann ein og hvør síggja, tí allar ger›abøkurnar eru at síggja á heimasí›uni hjá løgtinginum (www.logting.fo), sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir á, at tá fundurin tá var› settur, spurdi hann sum forma›ur, um nakar ætla›i at brúka minniolutaverjuna, so ynskti hann at fáa ta› at vita, á›renn máli› var› vi›gjørt. Tá bo›a›u teir tríggi andstø›ulimirnir frá, at ta› fóru teir at gera.

– Harvi› enda›i fundurin, uttan at máli› var› vi›gjørt, sigur Bjarni Djurholm, sum eisini er sannførdur um, at máli› heldur ikki hev›i veri› samtykt, var› ta› vi›gjørt.

– Vit høvdu als onga ávirkan á, at Signar á Brúnni fór í kassan eftir pengunum. Vildu teir fylgt reglunum, so kundu teir kalla› tingi› saman at játta hesa eykajáttan, og so var› mál› loyst eftir reglunum, og so var eingin trupulleiki.

– Ta› sama kann landsst‡ri› gera í hesum máli›. Teir kunnu kalla tingi› saman og játta pengar til løn til n‡ggja landsst‡rismannin, so sum ta› eigur at ver›a gjørt sambært st‡risskipanarlógini, sigur Bjarni Djurholm, fíggjarnevndarforma›ur.

Si›venja frá 1995

Sí›ani st‡risskipanin kom í gildi á ólavsøku í 1995 hevur ta› veri› si›venja, at fíggjarnevndin bert játtar pengar, um ta› er serliga ney›ugt. Annars er bara at kalla løgtingi› saman, sigur Vilhelm Johannesen, virkandi fíggjarnevndarforma›ur

EIRIKUR LINDENSKOV

Ta› var á ólavsøku í 1995 at n‡ggja st‡risskipanarlógin kom í gildi. Tá var Vilhelm Johanensen forma›ur í fíggjarnevndini.

– Vit vi›gjørdu sjálvandi broyttu arbei›sumstø›urnar hjá fíggjarnevndini, og hava sí›ani havt ta si›venju, at slík mál vísir nevndin frá sær. Eitt dømi um ta› var, tá Edmund Joensen, táverandi løgma›ur, ba› um eykajáttan til bygna›arbroytingarnar hjá Finn Norman Christensen. Hetta var› eisini afturvíst.

Eitt anna› dømi› var, tá løgma›ur í fjør ba› um eykajáttan til Signar á Brúnni at gjalda undirskoti› hjá Sjónvarpi Føroya. Hetta var› eisini avvíst. Eitt dømi um, at fíggjarnevndin hevur játta› slíkari umbøn, var tá játtast skuldu pengar til Kosovohjálpina.

– Tá mettu vit, at vit ikki kundu bí›a til tingi› kom saman. Skuldi hjálpin hava nakra meining, var ney›ugt at ganga umbønini á møti, sigur Vilhelm Johannesen.

Vilhelm Johannesen vísir á, at samgongan hevur meirilutan í tinginum. Ynskir hon at játta fleiri pengar, so er bara at kalla løgtingi› saman og samtykkja ta› solei›is, sum ta› eigur sambært st‡risskipanarlógini.

Havnin í ólavsøkubúnan

Broytingarnar skulu millum annað viðføra, at ferðslan skal ganga betri, og parkeringsóskilið í Miðbýnum fær helst ein enda við hesum

Allarhelst verður nýggi grasvøllurin í Miðbýnum á tremur, tá ólavsøkugestir í hópatali fara at mýkja røddina ólavsøkukvøld

Mynd: Jens Kr. Vang

JÁKUP MØRK

-Endamálið er fyrst og fremst, at Miðbýurin skal síggja betri út. Hetta sigur Heðin Mortensen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Kommunu, um tær broytingar, sum í løtuni fara fram í Miðbýnum.

Parkeringsóskilið loyst

Seinastu tíðina hava miðbýargestirnir sæð, at arbeitt hevur verið aftan fyri bygningin hjá Føroya Sparikassa, eins og nýggjar rípur eru at síggja á vegnum, tá koyrt verður eftir gongugøtuni.

Orsøkin til nýggju vegamerkingarnar er tann, at býráðið nú vil hava ferðsluna í Miðbýnum at ganga betri. Í stuttum er ætlanin við hesum tann, at bilar, sum koma úr Steinatúni og oman gjøgnum byin, nú verða noyddir at snara til høgru á Káta Horninum, meðan bilar, sum koma av Tinghúsvegnum oman móti Miðbýnum, skulu snara til vinstru á sama stað. Á henda hátt møtast bilarnir ikki, og hetta skuldi so viðført, at ferðslan fer at ganga lættari. Samstundis verða gongubreytirnar breiðkaðar, tí sum Heðin Mortensens sigur, so skal gongugøtan jú vera fyri gongufólk. Sum er, er hetta bert gjørt við strikum á vegnum, men innan stutta tíð verður ferðsluforðingin meira sjónlig.

Umframt at hetta eftir ætlan skal fáa ferðsluna at glíða betri, so er eisini líkt til, at hetta vil viðføra ein enda á tí parkeringsóskili, sum hevur valdað í Miðbýnum seinastu tíðina.

Framyvir verður tað nevnliga soleiðis, at parkering í Miðbýnum bert verur loyvd vinstrumegin, har básar verða uppmerktir til endamálið.

Kioskin verður verandi

Við bygningin hjá Sparikassanum og oman móti Tinghúsvøllinum, verður arbeitt við fullari ferð í hesum døgum.

Her er ætlanin, at ein snotuligur grasvøllur skal verða, haðani tað verður opið móti bæði Tinghúsvøllinum og trappuni millum Tinghúsið og Telegrafstøðina. Heðin Mortensen greiður frá, at ætlanin so er, at hesin vøllur skal kunna nýtast til alskyns endamál, eitt nú útimøtir, røður, sang og mangt annað.

Saman við áðurnevndu ætlan um ferðsluna skal hesin partur av Miðbýarætlanini vera liðugt gjørdur á ólavsøku, soleiðis at ólavsøku gestirnir kunnu uppliva ein snotuligan og nærum nýggjan Miðbý, uttan at hetta tó skal merkja, at mold og arbeiðsamboð sløðast nakrastaðni.

Í samband við arbeiðið at leggja flag aftan fyri Sparikassan, hevur verið umhugsað at flutt Kioskina í Miðbýnum, men fyri fyrst verður Asta verandi. Júst hvørjar ætlanir býráðið hevur í hesum sambandi, er ikki heilt greitt, men smb. Heðini Mortensen, er í øllum førum vist, at Kioskin verður verandi í Miðbýnum: -Kioskin í Miðbýnum er ein býarmynd, so hon verður so í øllum førum verandi í Miðbýnum.

Fríða um

Annars arbeiðir býráðið framhaldandi við at snøgga um í Miðbýnum, uttan at hetta kortini merkir nakra kollveltandi broyting í býarmyndini.

Nýggir flísar verða lagdir ymsastaðni, og ábøtur og viðlíkahald verður eisini gjørt í størst møguligan mun: –Ja, yvirhøvur royna vit at »shina« alt eitt sindur upp, sigur Heðin.

Ein sjónlig broyting verður tó at síggja í næstum. Gosvatnið við Káta Hornið, sum tó ongantíð hevur goyst nakað serligt, skal eftir ætlan flytast niðan til Svimjihøllina. Gosvatnið, sum samstundis er ein standmynd, varð í sínari tíð gjørt av Fridtjof Joensen, hevur so at siga ongantíð verið tendrað. Hetta tí fólk at kalla fingu karm, um bert eitt lítið lot var eftir Gongugøtuni.

Nú verður gosvatnið so flutt til meira hóskandi umhørvi við Svimjihøllina. Eingin standmynd ella líknandi verður sett upp ístaðin niðri í býnum, so yvirhøvur verður fríari í gongugøtuni.

Seinni verða helst lagdir flísar um alt Káta Horn, men hetta er alt liður í eini langtíðarætlan.

Fyri fyrst ræður um at snøgga høvuðsstaðin til, so hann verður snotuligur til ólavsøkuna ár 2000.

Ein vanlig býarmynd seinnu árini. Bilar settir alla staðni í miðbýnum, men eisini hesin trupulleiki verður loystur nú